Tór-Ingar nærkast HB

Sum gløggi lesarin ivaleyst hevur lagt til merkis, so taldist Tór-Ingar Akselsen millum málskjúttarnar, tá FS Vágar leygardagin vann 4-1 á B36 í aðru deild.

Tór-Ingar var í fjør partur av HB-liðnum, sum gjørdist føroyameistarar, og hann endaði eisini árið í landsliðshópinum til dystirnar móti Skotlandi og Litava.

Í ár hevur hann tó ikki verið at sæð í fremstu rød, men hevur ístaðin verður staddur uttanlands.

Nú er hann tó komin heimaftur á klettarnar, og einki er at ivast í, at tað eru fleiri feløg, sum fegin vilja hava hann at skifta aðru deildar fótbóltin í Vágum um við fótbólt í fremstu rød.

Eitt av feløgunum, sum hevur víst leikaranum áhuga, er HB, og tað hevur eisini ljóðað, at sáttmáli longu er gjørdur, men hetta verður tó avvíst av leiðsuni í felagnum.

– Vit hava sjálvandi verið í sambandi við Tór-Ingar. Tað hava vit verið, síðani hann fór av landinum, so tað er einki nýtt í tí. Men enn er so eingin sáttmáli skrivaður um nakað sum helst, sigur Birgir Enghamar, formaður Havnar Bóltfelag.

-jm

Claus Bech Jørgensen gleðir seg, nú hann fær møguleikan at taka lut í altjóða fótbólti

Claus gleðir seg sum eitt barn

– Eg vónaði leingi, at eg kundi fáa møguleikan á danska landsliðnum, men tann møguleikin kom ongantíð, og nú verður tað neyvan, sigur 28 ára gamli Claus Bech Jørgensen, sum nú skal spæla á føroyska landsliðnum

FÓTBÓLTUR
Eyðun Klakstein

Nú er tað endaliga váttað, at Coventry-spælarin og hálvi føroyingurin, Claus Bech Jørgensen, er nýggi maðurin á føroyska fótbóltslandsliðnum.

Hann er tikin út, eftir at Todi Jónsson hevur givið avboð vegna skaða.

– Eg vónaði leingi, at eg kundi fáa møguleikan á danska landsliðnum, men tann møguleikin kom ongantíð, og nú verður tað neyvan. Tí eri eg sera fegin um, at føroyingar hava víst áhuga fyri at brúka meg, sigur Claus Bech Jørgensen.

– Nú gleði eg meg sum eitt barn til at spæla á landsliðnum, og eg vóni, at tað fer at gangast væl.

Eigur met í Onglandi

Claus Bech Jørgensen spældi í eina tíð á liði saman við Johan Byrial Hansen í AC Horsens, men hann hevur seinastu árini roynt seg í enskum fótbólti. Hann hevur spælt fyri Bournemouth, Bradford og nú Coventry, sum spælir í næstbestu ensku deildini.

Vanliga spælir Claus Bech Jørgensen á miðvøllinum, og verður hann lýstur sum ein kvikur og driblisterkur leikari við góðum máltevi.

Hetta tevið hevur eisini av og á havt við sær, at venjararnir hava nýtt hann í álopspartinum, og eitt nú hevur hann eitt met í bretskum fótbólti. Hetta stavar frá tíð hansara í Bradford, har hann eitt skifti skoraði í sjey útidystum á rað, og tað hevur eingin annar leikari í enskum fótbólti megnað.

Franskar broytingar

David Trezeguet og Alou Diarra hava givið avboð til franska hópin, sum í komandi viku kemur til Føroya

Serliga munnu føroyskir áskoðarar iðra seg um, at Trezeguet ikki er við í hópinum, men fyri landsliðsvenjararnar, munnu hetta kortini vera góð tíðindi. Hvussu góð tey eru, kann tó altið tosast um, tí tá avloysararnir eita Cisse og Luyindala, verður uppgávan undir øllum umstøðum sera trupul.

Og tað eru so heldur ikki hvørjir sum helst, ið avloysa teir báðar. Fyri Trezeguet verður tað Louis Saha úr Mancester United, sum kemur í hópin, og fyri Diarra verður talan um Vikash Dharasoo, sum dagliga spælir í AC Milan.

Endaligi franski hópurin verður sostatt hesin:

Málverjar	
Fabian Barthez,	Olympique Marseille
Grégory Coupet,	Olympique Lyon
Verjuleikarar	
Eric Abidal,	Olympique Lyon
Jean-Alain Boumson,	Glasgow Rangers
Patrick Evra,	AS Monaco
William Gallas,	Chelsea FC
Gaël Givet,	AS Monaco
Bernard Mendy,	Paris-SG
Sébastian Squillaci,	AS Monaco
Miðvallarar	
Vikash Dharosoo,	AC Milan
Ludovic Giuly,	FC Barcelona
Dlaude Makelele,	Chelsea FC
Benoit Pedretti,	Olympique Marseille
Robert Pires,	Arsenal FC
Jérome Rothen,	Paris-SG
Patrick Vieira,	Arsenal FC
Álopsleikarar	
Djibril Cisse,	Liverpool FC
Thierry Henry,	Arsenal FC
Pegy Luyindula,	Olympique Marseilla
Louis Saha,	Manchester United

Eli á mál við súkkluni á rygginum

Tað var ikki sørt av dramatikki, tá tann seinasta FM kappingin var avvikla sunnumorgunin 29. august

SÚKKLING
tíðindaskriv

Hesaferð stóð býðarkoyring á skránni, og koyrt bleiv uppi á Hálsi í Tórshavn. Umstøðurnar vóru kanska ikki tær bestu, vegurin er asfalteraður fyri stuttum og tað regnaði hendan dagin. Av tí sama vóru vegirnir sera hálir og hetta kom eisini at hava ein stóra avirkan á kappingina.

Lagt var út við teimun vaksnu, teir súkklaðu 50 min. + 1 umg. Stutt eftur start gleyð Esmar Joensen í einum svingi og datt, súkklan fór illa og tí fekk hann ikki hildi framm. Esmar slapp sjálvir frá skelkinum við smarri snuddum.

Tað vísti seg skjótt at kappingin kom at standa millum Gunnar Dahl-Olsen og Eli Christiansen, tá tað lukkaðist teimun, at koma leysir frá hinum.

Gunnar royndi nakraferð at sleppa frá Eli, men Eli var væl koyrandi hendan dagin, tí var tað ongin kjansir hja Gunnar, at sleppa frá honum.

Komnir út á síðsta umgang fyldust teir og farast skuldi nú undir endaspurtin. Tvey sving skuldu fyrst takast, og í hesum seinna kom Eli ov hart inn í svingið. So hart, at eisini hann gleyð og datt. Við røttum sport anda reisti hann seg, sjálvt um hann hevði nógva pínu, tók sína súkklu, sum var illa farin, upp á ryggin og rann síðstu 50 metranir á mál. Eli gjørdit tí nummar tvey. Triður á mál kom Christian Guttesen.

Vinnarin var en einaferð Gunnar Dahl-Olsen, men hesaferð við stórari kapping frá Eli Christiansen.

Hjá unglingum vann Torkil Veyhe sannførandi. Nummar tvey var Dánial Míchaelsen og Bergur Johansen bleiv nummar trý.

Hjá børnum skuldi eisini ein niður á asfalti, hetta var Finnur Beder. Men eftir at hava verið ein túr á skaðastovuni var staðfest, at onki var broti, og hann slapp tí heimaftur við nøkrum snuddum og einum øðrum plássi.

Hetta var síðsta kapping hjá teimum vaksnu og unglingumí ár, tó skulla føroyski súkklarnir til Íslands um tríggjar vikur at royna kreftur móti Íslendarum. Gunnar Dahl-Olsen vann hesa kapping síðsta ár, so spenandi verður, um hann klárar, at endurvinna kappingina í ár.

Børn í bólki I, II og III hava enn ein møguleika at royna seg. Hetta verður í FM í einkultstarti. Lýst verður í miðlunum nær og hvar hendan kapping verður.

Úrslitini av býarkoyringini:

Vaksin:

Nr	Navn
1	Gunnar Dahl Olsen
2	Eli Christiansen
3	Christian Guttesen

Unglingar:

Nr	Navn
1	Torkil Veyhe
2	Dánial Michaelsen
3	Bergur Johansen

Bólkur I , 6 til 8 ár

Nr	Navn
1	Ragnar Kruse
2	Christian Johansen

Bólkur II, 9 til 11 ár

Nr	Navn
1	Finnur Mellemgaard

Bólkur III, 12 til 14 ár

Nr	Navn
1	Jógvan Ólavsson
2	Finnur Beder

Bólkur III, 12 til 14 ár (kappsúkklu)

Nr	Navn
1	Sigmund Olsen
2	Rúni Bláfoss
3	Nils Kristensen

Landssjúkrahúsið
Fo 100 Tórshavn

Sjúkrarøktarfrøðingar heilsuatstøðingur/røktari

Á deild 2 eru hesi størv leys at søkja:

Sjúkrarøktarfrøðingur í fast starv á starvsbrøki 1,0 í skiftandi vaktum frá 1. oktober 2004

Avloysarastarv fyri sjúkrarøktarfrøðing á starvsbrøki 1,0 í skiftandi vaktum frá 1. oktober 2004 til 31. juli 2005

Avloysarastarv sum heilsuatstøðingur/røktari á starvsbrøki 1,0 í skiftandi vaktum frá 1. oktober 2004 til 30. september 2006

Deildin er ein akut viðgerðardeild. Á deildini starvast sjúkrarøktarfrøðingar, pleygarar og heilsu-røktarar. Deildin er ein áhugaverd deild við nógvum avbjóðingum. Vit leggja okkum eftir, at starvsfólkið er í støðugari menningin og áhaldandi at betra um terapeutiska umhvørvið á deildini.

Arbeitt verður eftir kontaktpersónaskipanini og miljøterapeutiskum meginreglum. Deildin hevur tætt samstarv við aðrar fakbókar, so sum lækna, sálarfrøðing, sosialráðgeva, ergo- og fysioterapeut. Saman eru vit eitt lið, sum er um hin einstaka sjúklingin.

Setanartreytir:
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar/Føroya Psykiatrifelag og Fíggjarmálaráðið.

Upplýsingar um starvið:
Meira um starvið fæst at vita um við at venda sær til Birgit Andersen, deildarleiðara á D2 tlf. 304500, lokal 4002 ella til Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 4102, ella e-post bergitw@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 16. september 2004 kl. 12.00.

Skrivlig umsókn, merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til

Landssjúkrahúsið
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«.

Stór hús til sølu

Um hóskandi boð fæst eru eini stór hús í Sørvági til sølu.

Tlf. 332825 og 333012

LFÚ & LESANDI.FO

Søkt verður eftir einum skrivara til LFÚ og tíðindaportalin Lesandi.fo

Starvið sum skrivari hjá LFÚ og Lesandi.fo umfatar millum annað, vanligt skrivstovuarbeiði, samskiftið við skúlarnar og næmingarnar, fíggjarviðurskifti og samskipan av tiltøkum.

Arbeiðstíðin er millum 6 - 10 tímar um vikuna.
Løn sambart avtalu við LFÚ

lfu.fo & lesandi.fo

Førleikakrøv:
· Samskiftan
· Duga at arbeiða sjálvstøðugt
· Góð málbering á føroyskum og enskum
· Góðan teldukunleika

Umsóknir skulu sendast til:
LFÚ
Postrúm 136
FO-110 Tórshavn

Umsóknin skal vera LFÚ í hendi í seinasta lagi 9. september 2004

Meira fæst at vita við at ringja á tlf. 310220 ella 516332
ella á lfu@lfu.fo

Gravsteinar
Nýgerð og umvælingar.
BASALT
J.C. Svaboðsgøta 60
tel 211661 - 211662 - 321663
basalt@post.olivant.fo

Vit gera alt
URTAGARÐSARBEIÐI
• Grasvøllir • Planting • Viðlíkahald
• Seta gravsteinar upp v.m.
• Gera tún við flisum ella oljugrúsi
• Grevstur í sambandi við olljutangaskifti o.a.
Spyr - tað kostar einki!
Við 25 ára royndum hava vit roynt tað mesta
Fa. SÍMUN DALSGAARD
Boðanesgøta • FO-188 Hoyvík
Tel. 31 54 78 • Fartel. 28 21 00 • Fax 32 04 78

GER KVETTI
Opel Astra 1600 bíliga til sølu

Árg 97 · km. 85.000

Bilurin er í sera góðum standi og sera økonomiskur í brúki.

Til sølu vegna flyting

Áhugaði vinarliga ringi á tel 25 28 25 ella maila á gudny78@msn.com